# Fiskimaðurin hevur altíð verið fleksibul

**- Verða skip løgd av fíggjarligum ávum, tí tað loysir seg betur at liggja enn at fiska, verður ikki væl vorðið, sigur Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki stuttligt at vera tann, sum verður raktur av arbeiðsloysi – antin tað er á landi ella sjógvi. Ymiskt er tó, hvat gjørt verður burtur úr uppsagnum – ella flytingum av arbeiðsfólki. Í summum førum eru stórar yvirskriftir í bløðum, útvarpi og sjónvarpi; í øðrum førum er næstan tøgn. Soleiðis fingu flytingarnar av nøkrum sjúkrasystrum á føðideildini á Landssjúkrahúsinum nógva umrøðu – og ivaleyst av góðum grundum. At nøkur uppsøgd eisini fáa kreppuhjálp, er bert at fegnast um. Hetta kann verða við til at hjálpa teimum á føtur aftur.

Viðhvørt kann tað tó tykjast, sum um gjørt verður meira burtur úr summum starvsbólkum og starvsøkjum enn øðrum, tí tú hevur tey nærri uppat tær.

70 fólk missa arbeiði í alivinnuni í Norðoyggjum, 35 mans verða uppsagdir hjá P/F Beta, og einir 25 mans missa arbeiði umborð á Høgafossi.

Lítið hoyrist um hetta – og eingin tosar um kreppuhjálp!



*Fiskimenn eru ikki teir, sum rópa harðast, tá ið teir verða uppsagdir og missa hýru*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, vónar ikki, at fíggjarliga úrslitið hjá fleiri skipum verður so vánaligt, at tað fer at loysa seg betur hjá reiðaríum at leggja skipini – enn at sigla*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Uppsagnarløn - og síðan ALS

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, harmast um, at limir hjá honum og limir í øðrum manningarfeløgum missa hýru.

Hann vísir á, at fiskimenn sambært sáttmálanum hava uppsagnartíð og eiga uppsagnarløn – alt eftir, hvussu leingi teir hava siglt við reiðaríunum.

- Soleiðis hevur ein maður, sum hevur siglt við einum skipi í eitt ár, ein mánaða uppsagnartíð, og hevur hann siglt í tvey ár, er uppsagnartíðin tveir mánaðir.

Óli sigur, at hevur maðurin onga hýru í uppsagnartíðini, eigur hann uppsagnarløn frá reiðaríinum, sum svarar til mynstuløn.

- Teir, ið sigla við gomlu Kuba-trolarunum, fingu í uppsøgnini at vita, at skipini helst sigla einar fýra vikur aftrat. Soleiðis eiga teir, sum hava verið nóg leingi við hesum skipum, uppsagnarløn frá reiðaríinum fyri tíðina, tá ið eingin hýra er, og uppsagnartíðin enn er galdandi.

Hann sigur, at tá ið uppsagnartíðin er av, kunnu menninir – um teir onga hýru hava fingið aftur – fara upp í ALS-skipanina og har fáa útgjald, so leingi teir ikki hava funnið sær aðra hýru ella annað arbeiði.

## Fleksiblir fiskimenn

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag vísir á, at krepputíðir í Føroyum hava víst, at føroyski fiskimaðurin tíbetur er rættiliga fleksibul.

- Tað hevur nevniliga víst seg, at nógvir fáa aðra hýru – antin í Føroyum ella í londunum rundan um okkum, eitt nú í Danmark og Noregi. Soleiðis sigldu nógvir fiskimenn við útlendskum skipum undir kreppuni fyrst í nítiárunum.

Spurdur, hvørji úrlitini annars eru hjá fiskiskipaflotanum, sigur Óli Jacobsen, at vit neyvan nakrantíð sleppa undan upp-og niðurgongd, so leingi fiskað verður.

- Eg dugi ikki at siga, hvat bíðar fyri framman – og um vandi er fyri, at fleiri skip verða løgd. Tað skulu vit so ikki vóna, leggur hann aftrat.

Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði reiðarin hjá P/F Beta í Saltangará, Ragnar Olsen, at tað loysir seg betur fyri felagið at leggja tey gomlu skipini enn at hava tey siglandi, soleiðis sum gongdin er í løtuni.

- Eg vænti, at P/F Beta fer at selja sínar dagar til onnur skip, nú gomlu Kubatrolararnir verða seldir, og soleiðis kunnu fiskimenn eisini fáa nakað burtur úr hesum – ikki minst, nú talan aftur er um at skerja fiskidagarnar, sigur Óli.

## Heilt galið…

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag vónar tó ikki, at fíggjarliga úrslitið hjá fleiri skipum verður so vánaligt, at tað fer at loysa seg betur hjá reiðaríum at leggja skipini.

- Um so verður, kann tað skjótt gerast heilt galið, sigur Óli Jacobsen, sum annars er uttanlands í hesum døgum.

# Enniberg fer aftur í Irmingarhavið



*Ætlandi loysti flakatrolarin, Enniberg, aftur í gjár – eftir, at teir noyddust at bróta túrin av herfyri, tí spønir vóru í oljuni*

**Flakatrolarin, Enniberg, breyt túrin av í Irmingarhavinum herfyri, tá ið tað vísti seg, at teir høvdu fingið spønir í motoroljuna. Nú verður so loyst aftur og farið verður aftur í Irmingarhavið at gera túrin lidnan**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Flakatrolarin, Enniberg, hevur verið ein túr eystanfyri í ár. Skipari var Sonny Johannesen, sum plagar at føra skipið eystanfyri, og hesin túrurin var hampiliga góður.

16. apríl fór trolarin í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski, men nakað fyri 1. juni, tá ið túrurin var umleið hálvrunnin, vísti tað seg, at spønir vóru komnar í motoroljuna. Teir noyddust at gevast at fiska, og 1. juni kom skipið aftur á Havnina.

## Klárt at loysa

Á Tórshavnar Skipasmiðju hava teir arbeitt við at loysa trupulleikarnar; oljan er tappað av, maskinan er reinsað fyri spønir, og nú halda teir, at klárt er aftur at loysa.

Á reiðaríinum siga tey, at Enniberg skuldi á ein royndartúr í gjár fyri at vita, um alt var í lagi, og síðan var ætlanin at loysa og leggja leiðina aftur í Irmingarhavið.

Skipari á túrinum í Irmingarhavinum hevur verið Jógvan Líggjas Gregersen, og manningin telir 27 mans.

## Sami túrur

Á reiðaríinum siga tey, at nú lagt verður útaftur á hav, verður hetta í framhaldi av túrinum, sum byrjaði, 16. apríl, og manningin verður hin sama.

- Vit vænta, at Enniberg verður í Irmingarhavinum ein til hálvan annan mánaða aftrat. Tá ið túrurin er av, og skipið kemur aftur, verður aftur farið í Barentshavið at royna.

Á skrivstovuni siga tey, at væl av kongafiski var at fáa í Irmingarhavinum, tá ið teir noyddust at bróta túrin av, men nú frættist frá slakari fiskiskapi aftur.

Umborð á Ennibergi verður kongafiskurin skráskorin.